Fylgiskjal 4

From: Per Mikkelsen <pm@batafiskur.fo>
Sent: Thursday, July 23, 2026 4:08 PM
To: VMR-Journal <uvmr-journal@uvmr.fo>
Subject: Add. til kjak um Fiskidagur 5b

Góðan dag Bárður og fyrisiting,

Hvat er ein fiskidagur og hvat er ein feskur fiskur ?. Spurningar í stillaðir ofta í seinastuni.

Hjálagt er yvirlit av dagsins sølu á fmf, har eg havi skilt millum smærri bátar, red snella og størri við línu úr 5a.

65 avreiðingar/fiskidag geva 323 kg í meðal per bát og hjá 5a er meðal 1680 kg per bát frá 10 avreiðingum/fiskidøgum, ella ein munur á x5.

So spyr man tá smærru bátarnir mangla dagar jamen hví leggja teir ikki bara 2 dagar saman, men tað gera teir ikki, ivaleyst av trongu fysisku karmunum, har 2 kør í fara til 323 kg, og flestu bátar klára ikki tað dupulta tal umborð.
Hinvegin merkir "erligheitin" at fiskurin kemur til landingarmiðstøð sama dag og verður kruvdur á landi og hevur toppgóðsku um fyriskriftir eru fylgdar.

Kryvjing á landi er nýtt fyribrigdi í FO. Eg byrjaði sum stjóri á Bátafisk á Eiði í 2003, har vit vóru teir fyrstu í settu krøv til tíð og temperatur við at fiskurin skuldi landast niðurkøldur í ísvatni (sjógvur+ís). Tá bleiv alt kruvt umborð.
Íslendingar hava í mong harrans ár bara bløðga umborð og fingið fiskin beinleiðis í ísvatn, hjá teimum er definitiónin á ein feskan fisk, ein niðurkøldur bløðgaður ókruvdur fiskur. Her eru vit á veg, men langt er á mál. Har kruvt verður mest er á landingarmiðstøðini á Toftum, Barðinum í Tórshavn og Snarfrost í Miðvági. Suðuroyggin og norðoyggjar hava ikki kryvjing á landi.

Stóru saltfiskavirkini í FO, serliga Fiskavirkið Gøta og Vaðhorn hava fylgt kryvjing á landi reint góðskumessiga og um tú spyr stjóran á Fiskavirkinum Páll Gregersen er ongin ivi í hansara verð at kryviing á landi gevur bestu góðsku til saltfisk, har serliga uggarnir sum hava tydning fyri serliga flaktan tosk gerast heilt hvítir og kann seljast sum A vøra. Fiskur kruvudur beinleiðis umborð gevur ein reydligan kryvjiskurð, tað ger kryvjing á landi ikki.

Tað eru nógvir fyrimunir at kryvja á landi.

- Vøran endar sum ensilaga og til laksafóður, har serliga lýsiparturin er høgur og eftirspurdur.
- Ein maður við snellu ella línu hevur líka høga góðsku (um fyriskriftir um ísing/goymslu) verða fylgdar.
- Manning er meira úthvíld við at sleppa undan at kryvja umborð sum aftur merkir meira fokus á fiskiskap/góðsku og minni vandi fyri ásigling við heimferð, har kruvt verður, sum er eisini ein tryggdarspurningur.

Aftur hvat er ein fiskidagur ? Hann er jú út frá degnum í dag slett ikki til at definera. Munurin millum 323 kg fyri snellu og 1680 fyri línu er ein 5 falding í bóki 5 a og b.
Tað eru eisini nógv sosial aspektir í hesum. Av teim 65 landingunum er meðalaldur omanfyri pensjónsaldur. Har elsti maður á báti Súni Jacobsen er 90 ár á bátinum Markus. Hesin sami Súni fekk eitt tilfeldi og small um fyri mánaði síðani og mátti kannast væl, men var skjótur umborð aftur. Hvat var alternativi hjá honum og slíkum monnum um teir ikki sloppu at gera tað teir elska. Kanska at sita á einum sambyli fyri nógvar túsund kr per dag hjá samfelagnum ístaðin fyri at teir kunnu bidraga til handilsjavna og virksemi og verða við at skapa vøkstur uttan at tað nøgdarmessiga als ikki hevur nakra ávirkan í stóra samanhanginum.

Fylgiskjal 4

Ja hesir brúka nógvar dagar í 5b, men tað "keeps the doctor away". , men aðrir gera eisini. Ongin loyna er at nógivr útisiglarar á nótabátum, flakatrolarum og onnur í arbeiða við øðrum enn fiskivinnu eks 2 mdr út og 2 mdr heima, leggja frítíð eftir norðhavsróðri. Hendan meirinntøkan við síðuna av er ein partur av at man altíð hevur kunna farið til útróðrar og hvør vil ikki royna seg á norðhavinum, men hetta tekur eisini dagar frá teim í veruliga hava tørv á inntøku í 5 b og tað eru ikki fáir, also ein lívsneyðug inntøka.

Greitt er at um hesir í veruliga hava tørv á døgum alt árið og serliga til heystfiskaríi verða støðgaðir av øðrum bólkum sum ikki hava hetta fyri neyðini, ja so hava vit ein giganttrupuleika sum er øgiliga samansettur. Eks. Tekur man hetta frá pensjonistum ja so fær samfelagið aðrar trupuleikar sum samfelagið ikki megnar frammanundan og serliga í árini fyri framman við eldrabyrðini.

Skal man fara inn at regulera økonomiskt so man heldur teim í hava inntøkur aðrastaðni í samfelagnum frá at fiska í 5 b. Hetta gera norðmenn partvís við 50 % regli, so hetta er ein leistur til tess at fiska alt árið hjá teim í hava tørv á tí. Tydningarmest er at politiska skipanin torir at seta hesi ting í verk um man tvíheldur um fiskidagar, sum ikki gevur nakra meining og onki samanlíkningargrundarlag.(sí dømi frá í dag)
Haraftrat hava hesar nøgdir relativan lítlan tydning í mun til at vit selja 100 tals milljónir av svartkjafti til tess at skaffa kvotur aðrastaðni hjá teim í hava nokk frammanundan.

Vh
Per Mikkelsen
Sjálvstøðugur vinnurekandi

Landing 23 juli FMF			
kg/bát Snella	**tal av bátum**		**kg seld**
0-100	5		250
100-200	10		1500
200-300	20		5000
300-400	9		3150
400-500	9		4050
500-600	9		4950
600-900	3		2100
		Meðal/bát	
kg/bát Snella	**65**	**323**	**21000**
Kg/bát Lína (5a)	**10**	**1680**	**16800**